# Í Býin

# Góður matur á Marco Polo

**Maturin á Marco Polo í Havn er fjølbroyttur, góður og rímiliga bíligur. Men tænastan er ikki av tí besta**

UMMÆLI
*John Johannessen*



Matstovan Marco Polo í Sverrisgøtu í Havn er ein av teimum frægu í landinum. Umhvørvið er stak hugnaligt og maturin smakkar frágera væl.

Eitt annar fyrimunur við hesi matstovu er tann fjølbroytta matarskráin, har úrvalið spennir heilt frá burgara ella pitsu við eini øl afturvið til vínfjallasniglar við hvítvíni til forrætt og lamslundum og góðum reyðvíni til høvuðsrætt.

Eisini stak hugnaliga umhvørvið við ljósi frá gomlum gøtulampum undir loftinum og gøtuskeltum á bróstinum er avgjørt ein fyrimunur við hesi matstovu.

## Mugu betra tænastuna

Men Marco Polo hevur eisini síni lýti. Tænastan er avgjørt ikki á sama støði, sum í øðrum matstovum, ið borðreiða við betra slagnum av mati.

Mær dámar væl at eta á matstovu og geri tað rættuliga ofta, hóast tað er dýrt í Føroyum. Havi tí etið rættiliga ofta á Marco Polo, eins og á flest øðrum matstovum í landinum. Og tíverrri eri eg noyddur at staðfesta, at tæmastan á Marco Polo er minni góð enn hinum matstovunum á sama støði í miðstaðarøkinum.

Fyrstu ferð, eg át á Marco Polo, var eg saman við tveimum øðrum. Tá gloymdi kokkurin, at vit høvdu bílagt, og vit máttu bíða meira enn ein tíma, áðrenn vit fingu nakað at eta.

Tað eru nøkur ár síðani hesa hending. Tí havi eg roknað við, at talan bert hevur verið um byrjunartrupulleikar. Men í vetur var eg einaferð saman við fimtan øðrum á Marco Polo og át. Tá fingu øll hini mat, men eg fekk ongan, tí tænastufólkini høvdu gloymt bílegging mína. Tískil fekk eg at eta, tá hini vóru liðug, og mátti eg kortini rinda fult gjald fyri matin. Sum troyst fekk eg ein kopp av kaffi og ein konjakk afturvið.

Aftur hesaferð sló eg meg til tols við, at hetta mátti vera eindømi.

Men tríggjar mánaðar seinni upplivdi ein, eg át saman við, júst tað sama. Vit vóru eini sjey fólk úti og ótu, og tá maturin kom, var tað ein, ið einki fekk. Hon mátti eta, tá vit vóru liðug og gjalda fullan prís.

## Góður matur

Tað er spell, at tað skal knýpa so við tænastuni á Marco Polo. Tí maturin á Marco Polo er besti maturin, tú fært á nakrari matstovu í Havn. Tí vil eg mæla eigarunum til at betra um tænastuna sum skjótast. Hetta fer heilt avgjørt at gera, at fleiri vitja frálíku matstovuna, sum eisini hevur eina frálíka long drink barr á loftinum.

Við Sosialinum
# Í BÝIN

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

Les í býin hvønn hósdag !

Vilja tygum við
Í Býin
- hvønn hósdag

Ynskja tygum at lýsa í teiginum Í Býin, so fyllið út henda lepan og sendið hann til Sosialin, boks 76, FO-110 Tórshavn - ella Fax: 31 47 20

Tekstur

# Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin



# Í Býin

Kaggin
2. páskakvøld spæla
Kaggin ARIA
www.kaggin.fo

Í Býin
- hvønn hósdag

AUTO
-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
AUTO 311234

Á matarseðlinum
LASAGNA 49,-
FRIKADELLUR 49,-
BAKAÐ EPLI 45,-
v/ avocado dip
Livandi tónleikur
Café NATUR
Tlf. 31 20 25

Felagið Tórshøll
Um páskirnar er opið:
2. páskadag
Nú fleiri ódýrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

fk Matseðilin
Leygardagin 14. apríl:
Fleskasteik
Týsdagin 17. apríl:
Fiskafrikadellur
Mikudagin 18. apríl:
Lasagne
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postboks 107
110 Tórshavn
Tel. 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

HESA VIKUNA
Eyðfinn Drewsen Mikukvøldið Opið 21–24
Stongt Skírishóskvøldið
Eyðfinn Drewsen Langi fríggjadagur Opið 24–04
Eyðfinn Drewsen Leygarkvøldið Opið 22–04
14,95 pr. eind frá 22.00 til 00.30
Stongt 1. páskadagur
Høgni Øster 2. páskadagur Opið 22–04
Café'in: Skírishósdag Stongt
Langi fríggjadagur Stongt
Leygardagur 14–23
1. páskadagur Stongt
2. páskadagur 17–23
Club 20 Café
Piparbúffur bert v/salat, chips & piparsós
TANN BESTI Í LANDINUM 69,–
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÝGGJA
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Manhattan
Fríggjakvøldið 20/4
Livandi tónleikur
Sámal & Ronnie
Manhattan

JOHN's RESTAURANT
Á páskum er opið soleiðis:
Skírisdag 12/4 stongt
Leygardag 14/4
GÓÐAR PÁSKIR

Sjavskapping verður mikukvøldið
Dansur verður 2. Páskakvøld
Jan skipar fyri
Klaksvíkar Klubbi

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg